


## KJ Hydraulik søkir goymslufólk og goymslulærling



Til goymslu okkara á Kambsdali søkja vit eftir einum goymslufólki og einum goymslulærlingi.

Lærutíðin er 3 ár, um tú hevur FHS, og 2 ár um tú hevur HH.

Ert tú ágrýtin, hevur áræði og hug til at útbúgva teg á einum dynamiskum virki, so ert tú møguliga tann, ið vit leita eftir.

Ert tú áhugað/ur, send so skrivliga umsókn, saman við møguligum prógvi, innan fríggjadagin 27. juni 2008.

Eru spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Petur Poulsen, goymsluleiðara á telefon 588830.

Umsóknir viðgjørdar í trúnaði.

KREA

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

Postsmoga 110 · Kambsdalur
Tel 40 70 00 · Faks 40 70 01 · info@kj.fo · www.kj.fo




Kom og ver við at seta tín dám á at uppbyggja og skapa ein frítíðarskúla við nógvum spennandi og mennandi møguleikum, t.d. eru rúm til drama, tónleik, teldu, máli-, træ-, og leirverkstað og drívhús.

### Vit kunnu bjóða

Eitt áhugavert og spennandi starv, har tú frá byrjan sleppur at verða við til at mynda títt dagliga arbeiði og skapa ein tryggan og fjølbroyttan gerandisdag saman við børnunum, har vinarlag, trivnaður, spæl, rørsla og ymiskt ítriv hevur stóran leiklut í gerandisdegnum.

Frítíðarskúlin hevur pláss fyri 96 børnum í aldrinum 6-9 ár. Frítíðarskúlin og skúlin fara at arbeiða tætt saman, har barnið er í miðdeplinum.

### Hetta vænta vit av tær

At tú ert nýhugsandi og skapandi, hevur virðing fyri tí einstaka barninum, kanst virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur og vilt verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí, sum vit seta okkum sum mál.

### Vit hava brúk fyri tykkum

- 4 pedagogum harav einum ítróttarpedagogi 20-30 tímar um vikuna.
- 3 hjálparfólkum 20-25 tímar um vikuna
- 1 starvsfólki til barn við serligum tørvi
- 1 køkshjálp 25 tímar

Størvini verða sett frá 11. august 2008.

### Setanarviðurskifti

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

### Ynskir tú at vita meira?

So ring til stovnsleiðaran Sandru Mikkelsen, telefon 21 43 64.

### Umsókn

Saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skulu sendast til Frítíðarskúlan Stoffalág 60, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 28. juni 2008.

Tórshavnar kommuna